

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 08 - 2013

# Stórur áhugi fyri oljuleiting við Jan Mayen

Fleiri av heimsins størstu oljufeløgum, teirra millum BP, ConocoPhillips og Statoil hava stóran áhuga fyri at fara undir kanningar og leiting á leiðunum við Jan Mayen. Tað er norska oljudirektoratið, sum hevur latið gera seismiskt tilfar bæði frá leiðunum við Jan Mayen og landssynningspartinum av Barentshavinum og sum síðani hevur boðið tilfarið til sølu millum oljufeløg. Tað vísir seg, at oljufeløg hava stóran áhuga fyri seismikkinum og millum feløgini, sum hava keypt tilfar, eru ENI, BG, GDF Suez, Shell, Total, Chevron, Tullow Oil, Lundin, Det Norske Oljeselskap og Idemitsu, Dong og OMV fyri bert at nevna nøkur teirra. Heili trý av hesum feløgum arbeiða eisini í føroyskum øki. Tað er upprunaliga norski staturin, sum hevur goldið fyri at skjóta seismikkin. Higartil hava 15 oljufeløg keypt seismikk fyri meira enn 180 mill. kr. Norska stjórnin lat herfyri upp fyri leiting á einum øki uppá 44.000 ferkilometrar í landssynningspartinum av Barentshavinum. Hetta er eitt øki, sum fyrr varð merkt av ósemju millum Norra og Rusland. Nú er semja gjørd har. Mett verður at her finnast einar 2 mia. tunnur av olju og gassi. Roknað verður við at myndugleikarnir fara at bjóða út øki til leiting her seinni í ár. Kortini verður økið við Jan Mayen at bíða nakað til útbjóðing, tí myndugleikarnir ynskja at gera fleiri kanningar.